Heilsustýrið

Krabbameinstilburðir í Føroyum 2013-2022

16/12/2024

Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo

Útgevari
Heilsustýrið
Eirargarður 2, 2. Hædd
100 Tórshavn

Útgáva 1.0
Útgávudagfesting 16. desembur 2024
Heimasíða: www.hst.fo

Rithøvundar
Elna Dam Dahl-Olsen
Sæunn Ó. Hansen

Heiti
Krabbameinstilburðir í Føroyum 2013-2022

Fororð

Tá ið Heilsustýrið varð sett á stovn 1. januar 2023 gjørdi Heilsumálaráðið av, at Krabbameinsskrásetingin skuldi flytast frá Landssjúkrahúsinum til Heilsustýrið at umsita. 1. september sama ár yvirtók Heilsustýrið Krabbameinsskránna, sum ásett í Kunngerð um krabbameinsskránna, og broytt við kunngerð nr. 74 frá 20. juni 2024.

Hetta er fyrsta frágreiðing um krabbameinstilburðir frá Heilsustyrinum, og í framtíðini fer ein nýggj frágreiðing at verða løgd fram á hvørjum ári.
Endamálið er, at hagtøl um krabbamein eru tøk fyri almenninginum í Føroyum. Frágreiðingin vendir sær til fakfólk innan heilsuøkið, granskarar, myndugleikar, politikarar og leikfólk, ið hava áhuga fyri heilsuhagfrøði.

Frágreiðingin inniheldur tøl úr føroysku Krabbameinsskránni, sum vísa gongdina fyri nýggjar krabbameinstilburðir í tíðarskeiðnum frá 2013 til 2022. Hetta fevnir um øll krabbameinssløg, harafturat skift sundur í útvaldar diagnosubólkar. Eisini verður greitt frá, hvussu prevalensurin av krabbameini er í føroysku búfjøldini. Harafturat eru talvur, ið vísa eitt meira nágreinað býti.
Heilsustýrið er við í norðurlendska krabbameinsstýrinum, og í hesum samstarvi verða hagfrøðiligar metingar gjørdar, soleiðis at øll hagtølini eru validerað.

Jólini 2024

Bjarni á Steig, stjóri

Innihaldsyvirlit

1.1 Krabbameinsskráin í Føroyum 1

1.2 Søgan um Krabbameinsskránna 1

1.3 Føroysk krabbameinstøl í NORDCAN 2

1.4 Nýggir tilburðir í 2022 2

2.0 Gongdin á krabbameinsøkinum fyri tíðarskeiðið 2013-2022 4

2.1 Høvd – og hálskrabbi 5

2.2 Tjúkk – og endatarmskrabbi 6

2.3 Krabbi í andaleiðini 7

2.4 Móðurmerkja- og annar húðkrabbi. 8

2.5 Prostatakrabbi 9

2.6 Testikelkrabbi 10

2.7 Bróstkrabbi 11

2.8 Lívmóðurháls-, lívmóður- og eggjastokkakrabbi 12

2.9 Landrás- og nýrakrabbi 13

2.10 Krabbi í heila- og miðnervalagi 14

2.11 Krabbi í lymfum og blóðvevnaði 15

3.0 Prevalensur 16

3.1 Gongdin í prevalensinum 2013-2022 18

4.0 Fylgiskjøl 19

1.1 Krabbameinsskráin í Føroyum

Kunngerðin um krabbameinsskráseting, sum er dagførd við kunngerð nr. 74 frá 20. juni 2024, ásetur skyldur og reglur fyri Krabbameinsskráseting Føroya. Heilsustýrið umsitur og mennir skrásetingina, sum hevur til endamáls at tryggja eina fullfíggjaða fráboðan av krabbameinstilburðum.

Læknar í føroyska sjúkrahúsverkinum hava skyldu at fráboða nýggjar krabbameinstilburðir til Krabbameinsskránna. Fráboðanin skal innihalda grundleggjandi upplýsingar um sjúklingin, ICD-10 diagnosu, dagfesting fyri diagnosu, histologiska/cytologiska diagnosu, fyrsta sambandið við lækna, hvørjar kanningar eru gjørdar og hvørjar viðgerðir eru settar í verk. Ásett er í kunngerð, hvussu fráboðanin fer fram, og hvørjar krabbameinssjúkur skulu fráboðast. Heilsustýrið hevur eftirlit við krabbameinsfráboðanunum og skrásetir nýggju tilburðirnar í Krabbameinsskránna.

Endamálið við at savna og goyma upplýsingarnar er:

- At gera hagtøl og frágreiðingar um útbreiðsluna av krabbameini í Føroyum.
- Gransking innan krabbamein.
- At greina krabbameinstilburðirnar fyri at kunna leggja til rættis í sjúkrahúsverkinum.

Henda skipan tryggjar eina skrá, ið gevur yvirlit og møguleika fyri betri gransking og arbeiði við krabbameini í Føroyum.

1.2 Søgan um Krabbameinsskránna

Søgan um Krabbameinsskránna er í stuttum, at í 1994 varð Krabbameinsskráseting Føroya stovnað eftir áheitan frá Kræftens Bekæmpelse. Í fyrstuni í samstarvi við Kræftens Bekæmpelse og seinni burturav á medisinsku deild á Landssjúkrahúsinum. Á hvørjum ári varð alt tilfarið um krabbameinstilburðir gjøgnumgingið. Hugt varð eftir øllum teimum, ið vóru deyð og øllum, sum vóru skrásett í Krabbameinsskránni. Farið var fimm ár aftur í tíðina regluliga fyri at fáa alt við. Upplýsingarnar í skránni ganga aftur til 1960-árini, tá arbeiðið at skráseta krabbameinstilburðir byrjaði í Føroyum.

Krabbameinsskráin varð flutt frá Landssjúkrahúsinum til Heilsustýrið at umsita 1. september 2023. Arbeiðið heldur fram eftir sama yvirskipaða leisti, samstundis sum arbeitt verður við at nútímansgera og talgilda arbeiðsgongdir við skrásetingini.

1.3 Føroysk krabbameinstøl í NORDCAN

NORDCAN er ein dátugrunnur við krabbameinstølum úr øllum Norðurlondum. Dátugrunnurin hevur upplýsingar um nýggjar krabbameinstilburðir, deyðiligheit av krabbameini, talið av persónum, sum liva við eini krabbameinsdiagnosu (prevalens), og yvirliving eftir krabbamein. Ymisku hagtølini eru frítt atkomulig í talvum og yvirlitum fyri meira enn 50 ymisk sløg av krabbameini.

Eina ferð árliga verða skrásetingar í føroysku krabbameinsskránni lagdar inn í NORDCAN. Hetta letur upp fyri, at til ber at samanbera føroysku tølini við hini Norðurlondini. NORDCAN dátugrunnurin er tøkur her https://nordcan.iarc.fr/en.

1.4 Nýggir tilburðir í 2022

Í 2022 vóru 357 nýggir krabbameinstilburðir skrásettir í Føroyum, sum er sami títtleiki sum árið fyri (2021). Talva 1 vísir, hvussu gongdin hevur verið viðvíkjandi nýggjum tilburðum frá 2013 til 2022. Talið av nýggjum krabbmeinstilburðum endurspeglar ikki aldursstandardiseraða títtleikan (aldersstandardiseret incidensrate), sum var eitt vet lægri í 2022 samanborið við 2021. Í 2022 var títtleikin 452 pr. 100.000 persónar, meðan tað var 477 pr. 100.000 persónar í 2021 (Talva 1)

Talva 1. Nýggir krabbameinstilburðir og títtleiki (aldursstandardiserað*), 2013-2022.

Ár	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Títtleiki (samanlagt)	254	218	273	248	293	360	317	332	357	357
Títtleikastig (aldursstandardiserað*)	429	360	432	389	441	529	452	460	477	452

Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

Á Mynd 1 sæst, hvussu aldursstandardiseraði títtleikin fyri øll krabbameinssløg hevur verið í tíðarskeiðnum 2013-2022. Hjá føroysku kvinnunum var aldurstandardiseraði títtleikin 483 pr. 100.000 kvinnur, og hjá føroysku monnunum var aldurstandardiseraði títtleikin 421 pr. 100.000 menn í 2022.



Mynd 1. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. november 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

Aldursstandardiseraður títtleiki

Flestu krabbameinssløg raka í høvuðsheitum eldri fólk. Tí hevur gongdin í aldurssamansetingini í búfjøldini ávirkan á samlaða talið av krabbameinstilburðum, og tað kann gera samanbering yvir tíðarskeið torførari. Við at nýta aldursstandardiseraðan títtleika verður hædd tikin fyri broytingum í aldrussamansetingini í búfjøldini. Í hesi frágreiðingini verður aldurssamansetingin hjá føroyska fólkinum í ár 2000 nýtt fyri at aldursstandardisera títtleikan av krabbameinstilburðum pr. 100.000 fyri menn og kvinnur fyri at tryggja tøl,sum kunnu samanberast yvir tíð.

2.0 Gongdin á krabbameinsøkinum fyri tíðarskeiðið 2013-2022

Í hesum brotinum verður greitt frá gongdini fyri nýggjar krabbameinstilburðir í útvaldum diagnosubólkum fyri tíðarskeiðið 2013-2022. Diagnosukoturnar, sum fevna um diagnosubólkarnar, eru greinaðar í fylgiskjali 1. Grafar vísa aldursstandardiseraða títtleikan av útvaldum diagnosubólkum fyri hetta tíðarskeiðið. Talvur við tølum av nýggjum tilburðum og aldursstandardiseraða títtleikanum fyri kvinnur og menn eru í fylgiskjølunum 1-4.

Diagnostiskur aktivitetur

Økt uppmerksemi orsakað av diagnostiskum aktiviteti og skreening kann hava við sær økt tal av krabbameinstilburðum, sum eisini hevur ávirkan á, nær í sjúkugongdini diagnosan verður sett. Tá skreeningsprogramm verða sett í verk, sæst ein øking av diagnostiseraðum tilburðum og harafturat serliga tilburðir, sum eru staðfestir tíðliga í sjúklingagongdini. Í Føroyum finst skreeningstilboð fyri lívmóðurháls – og bróstkrabba. Skreeningin fyri lívmóðurhálskrabba byrjaði í 1995 og bróstkrabbaskreeningin byrjaði í 2017.

2.1 Høvd – og hálskrabbi

Bólkurin høvd- og hálskrabbi fevnir um krabbamein í varrum, munnholu, svølgi, næsum, millumoyrum, hjáholum, barkakýla og skjaldkertli (sí fylgiskjal 1). Í tíðarskeiðinum 2013-2022 vórðu ávíkavist 77 menn og 37 kvinnur diagnostiserað við høvd- og hálskrabba í Føroyum (sí fylgiskjal 2).

Aldursstandardiseraður títtleiki fyri høvd- og hálskrabba hjá monnum er fallin frá 36,5 nýggjum tilburðum pr. 100.000 menn í 2021, sum var tað hægsta fyri tíðarskeiðið 2013-2022, til 25,0 nýggjar tilburðir pr. 100.000 menn í 2022 (sí fylgiskjal 3). Hjá kvinnunum er títtleikin fallin frá 24,6 nýggjum tilburðum pr. 100.000 kvinnur í 2021 til 6,6 nýggjar tilburðir pr. 100.000 kvinnur í 2022. Hægsti títtleikin hjá kvinnunum fyri tíðarskeiðið var 32,4 pr. 100.000 kvinnur, hetta var í 2016 (sí fylgiskjal 4).



Mynd 2. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri høvd- og hálskrabba deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000 aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardiserað verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.2 Tjúkk – og endatarmskrabbi

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 vóru 197 menn og 165 kvinnur diagnostiserað við tjúkk- og endatarmskrabba í Føroyum (sí fylgiskjal 2).

Fyri tjúkktarmskrabba var aldursstandardiseraði títtleikin hjá monnumum 55,9 pr. 100.000 menn. Hetta er ein hækking uppá 43,7 % í mun til 2021 (38,9 pr. 100.000 menn) (sí fylgiskjal 3). Hjá kvinnunum var aldursstandardiseraði títtleikin 35,4 pr. 100.000 kvinnur, sum er ein lækking í mun til 2021 (39,2 pr. 100.000 kvinnur) (sí fylgiskjal 4).
Tá hugt verður at endatarmskrabba sæst, at títtleikin fyri føroyskar kvinnur er fallin frá 26,2 pr. 100.000 kvinnur í 2021 til 18,7 í 2022 (sí fylgiskjal 4). Hjá føroysku monnunum er aldursstandardiseraði títtleikin hækkaður frá 19,7 pr. 100.000 menn í 2021 til 27,3 í 2022 (sí fylgiskjal 3). Hægsti títtleikin hjá kvinnum í hesum tíðarskeiðnum var í 2018 og var hann uppá 34,7 pr. 100.000 kvinnur. Hjá monnunum var hægsti títtleikin í hesum tíðarskeiðnum 33,1 pr. 100.000 menn, og var hetta í 2019 (sí fylgiskjal 4).



Mynd 3. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri tjúkktarms- og endatarmskrabba deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.3 Krabbi í andaleiðini

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 vóru 111 nýggir tilburðir millum kvinnur og 139 nýggir tilburðir millum føroyskar menn (Sí fylgiskjal 2). Hjá føroysku kvinnunum var aldursstandardiseraða títtleikatalið 42,8 pr. 100.000 kvinnur í 2022 samanborið við 38,9 pr. 100.000 kvinnur í 2021 (sí fylgiskjal 4). Hjá monnum var aldursstandardiseraði títtleikin 33,3 pr. 100.000 menn í 2022 samanborið við 26,2 pr. 100.000 menn í 2021 (sí fylgiskjal 3).

Hægsti títtleikin hjá kvinnum fyri tíðarskeiðið 2013-2022 var 51,3 pr. 100.000 kvinnur, hetta var í 2015. Hjá monnunum var hægsti títtleikin fyri tíðarskeiðið 72,6 pr. 100.000 menn, og var hetta í 2018 (sí fylgiskjøl 3 og 4).



Mynd 4. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri krabba í andaleiðini deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.4 Móðurmerkja- og annar húðkrabbi.

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 vóru 542 nýggir tilburðir av móðurmerkja- og annan húðkrabba[1], 322 kvinnur og 220 menn (sí fylgiskjal 2).

Sambært mynd 5 er aldursstandardiseraði títtleikin av móðurmerkja- og annan húðkrabba hjá føroysku kvinnunum fallin frá 2021-2022, og tað sama er galdandi fyri annan húðkrabba hjá føroysku monnunum, í meðan títtleikin fyri móðurmerkjakrabba hjá monnum er vaksin síðan 2019.

Aldursstandardiseraði títtleikin í 2022 fyri móðurmerkjakrabba hjá kvinnunum var 29,2 pr. 100.000 kvinnur, og fyri annan húðkrabba var aldursstandardiseraði títtleikin 122,8 pr. 100.000 kvinnur. Hjá monnunum var aldursstandardiseraði títtleikin pr. 100.000 menn í 2022 ávikavist 52,5 fyri annan húðkrabba og 18,6 fyri móðurmerkjakrabba.



Mynd 5. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri móðurmerkja- og annan húðkrabba deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

[1] Síðani 2020 er Kerakantom (variantur av diffirentieret Planocelluler carcinom) lagt afturat bólkinum "annar húðkrabbi". Sambært WHO ICD03 útgávuni, skal hesin bólkurin telja sum "annar húðkrabba". Henda broytingin hevur hægri títtleika við sær.

2.5 Prostatakrabbi

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 fingu 289 føroyskir menn staðfest prostatakrabba (sí fylgiskjal 2). Mynd 6 vísir, at aldursstandardiseraði títtleikin fyri prostatakrabba var 109,1 pr. 100.000 menn. Hetta er ein hækking í mun til 2020, tá 63,2 pr. 100.000 menn fingu staðfest prostatakrabba (sí fylgiskjal 3). Títtleikin í 2022 er nærum eins høgur sum í 2015 og 2019, sum vóru tey árini í hesum 10 ára tíðarskeiðinum, tá flest føroyskir menn fingu staðfest prostatakrabba.



Mynd 6. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri prostatakrabba 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.6 Testikelkrabbi

Í 2022 var aldursstandardiseraði títtleikin av testikelkrabba (eistunum) 12,0 pr. 100.000 menn. Gongdin hevur verið fallandi síðan 2018, tá aldursstandardiseraði títtleikin var hægstur í tíðarskeiðnum við 37,5 pr. 100.000 menn. Í 2021 varð ongin tilburður skrásettur (sí fylgiskjal 3). Testikelkrabbi er ørvísi enn onnur krabbasløg, við tað at størsti parturin av nýdiagnostiseraðu við testikelkrabba eru ungir menn. Í tíðarskeiðinum 2013-2022 vóru 77,2 % av monnunum, sum fingu staðfest testikelkrabba undir 45 ár.



Mynd 7. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri testikelkrabba, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.7 Bróstkrabbi

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 fingu 310 føroyskar kvinnur staðfest bróstkrabba (fylgiskjal 2). Aldursstandardiseraði títtleikin fyri bróstkrabba hevur víst eina fallandi gongd síðani 2019, tá hann var hægstur í hesum tíðarskeiðinum við 132,7 pr. 100.000 kvinnur. Í 2022 var títtleikin lægstur fyri tíðarskeiðið, við 85,6 pr. 100.000 kvinnur (sí fylgiskjal 4).



Mynd 8. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri bróstkrabba 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.8 Lívmóðurháls-, lívmóður- og eggjastokkakrabbi

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 vóru 140 nýggir tilburðir av lívmóðurháls-, lívmóður- og eggjastokkakrabba staðfestir (fylgiskjal 2). Aldursstandardiseraði títtleikin pr 100.000 kvinnur fyri henda bólkin var nærum eins fyri árið 2022, ávikavist 22,7 fyri lívmóðurhálskrabba, 21,1 fyri lívmóðurkrabba og 23,5 fyri eggjastokkakrabba. Títtleikin pr. 100.000 kvinnur fyri eggjastokkakrabba og lívmóðurhálskrabba er hækkaður ávikavíst síðan 2019 og 2021, meðan títtleikin fyri lívmóðurkrabba er nærum óbroyttur frá 2021 til 2022 (sí fylgiskjal 4).



Mynd 9. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri lívmóðurháls-, lívmóður- og eggjastokkakrabba 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.9 Landrás- og nýrakrabbi

Krabbamein í landrásini og nýrum fevnir umframt nevndu um nýrakoku, landræsi, landbløðru, harafturat "urothelial carcinoma in situ" og aðrar ikki-invasivar tumorar í landrásini (sí fylgiskjal 1). Hesin bólkur av krabbasjúku vísir seg oftari hjá monnum enn hjá kvinnum, og tað er eisini galdandi í Føroyum (sí mynd 10). Bæði hjá monnum og kvinnum gongur farstrikan uppeftir. Hjá kvinnunum var aldursstandardiseraði títtleikin í 2022 hægstur fyri tíðarkeiðið 2013-2022 á 32,4 pr. 100.000 kvinnur. Hjá monnunum var aldursstandardiseraði títtleikin á 51,5 pr. 100.000 menn í 2022, sum er eitt vet lægri, enn tá talið var hægst fyri tíðarskeiðið, hetta var í 2020, tá aldursstandardiseraði títtleikin var 59,0 pr. 100.000 menn.



Mynd 10. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri landrás- og nýrakrabba deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.10 Krabbi í heila- og miðnervalagi

Í Føroyum vóru 48 tilburðir av krabbameini í heila- og miðnervalagnum staðfestir í tíðarskeiðnum 2013-2022. Títtleikin av hesum krabbaslagnum er lækkaður síðani 2020 (sí fylgiskjal 2). Í 2022 var aldursstandardiseraði títtleikin 2,9 pr. 100.000 kvinnur, meðan hann hjá monnum var 4,9 pr. 100.000 (sí fygiskjøl 3 og 4).

Bólkurin krabbi í heila- og miðnervalagið fevnir eisini um góðkynjaðar tumorar (benign neoplasi) (sí fylgiskjal 1).



Mynd 11. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri krabba í heila og miðnervalagnum deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

2.11 Krabbi í lymfum og blóðvevnaði

Í tíðarskeiðnum 2013-2022 fingu 90 kvinnur og 139 menn krabbamein í lymfur ella blóðvevnaðin (sí fylgiskjal 2). Í 2022 var aldursstandardiseraði títtleikin hjá føroysku kvinnunum 21,9 pr. 100.000 kvinnur í mun til 47,2 í 2021 (sí fylgiskjal 4). Hjá føroysku monnunum er títtleikin av krabbameini í lymfum og blóðvevnaði hægri enn hjá kvinnunum. Aldursstandardiseraði títtleikin hjá monnunum var 40,9 pr. 100.000 menn í 2022. Hetta er nærum óbroytt í mun til 2021, tá títtleikin var 40,8 pr. 100.000 menn (sí fylgiskjal 3).

Títtleikin av krabbameini í lymfum og blóðvevnaði hevur sveiggjað nakað í tíðarskeiðnum, har títtleikin hjá kvinnum var hægstur á 52,5 í 2019 og lægstur í 2020 á 18,7. Í tíðarskeiðnum varð hægsti títtleikin hjá monnum skrásettur í 2020 við 61,6 pr. 100.000 menn, meðan lægsti títtleikin var í 2019 við 33,4 pr. 100.000 menn (sí fylgiskjøl 3 og 4).



Mynd 12. Aldursstandardiseraður títtleiki* (pr. 100.000 persónar) fyri krabba í lymfum og blóðvevnaði deilt á kyn, 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Nota: *Títtleikin (incidensratan) er talið av nýggjum tilburðum pr. 100.000, aldursstandardiserað til føroysku búfjøldina í ár 2000. Við at aldursstandardisera verður atlit tikið til aldursgongdina hjá føroysku búfjøldini, tá nýdiagnostiseraðir tilburðir verða sammettir yvir ár.

3.0 Prevalensur

Við ársenda 2022 vóru 3965 fólk, ávíkavist 1772 menn og 2192 kvinnur í Føroyum, sum livdu við krabbameini, ella sum áður høvdu fingið staðfest eina krabbameinsdiagnosu (prevalentir tilburðir). Ein persónur kann verða skrásettur við fleiri fráboðanarskyldugum krabbameinssjúkum í útvaldu diagnosubólkunum. Um ein persónur hevur fleiri fráboðanarskyldugar krabbmeinsdiagnosur í sama diagnosubólki, telur einans tann fyrst diagnostiseraði tilburðurin við í uppgerðini av prevalensinum.

Talva 2 vísir prevalentar tilburðir í Føroyum hjá monnum, býtt eftir útvaldum diagnosubólkum og árstølum. Størsti bólkurin hjá monnum er Annar húðkrabbi, við 295 á lívi við ársenda í 2022.

Talva 2. Prevalensur fyri menn býtt eftir diagnosubólkum og ári.

	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Títtleiki (samanlagt)	831	887	976	1040	1134	1262	1384	1499	1620	1772
Høvd og hálsur	28	32	36	42	48	55	59	66	75	83
Tjúkktarmur	65	70	81	86	93	110	124	134	144	159
Endatarm	1	2	8	10	10	17	25	29	33	42
Andaleiðin	21	22	25	30	33	43	47	51	55	61
Móðurmerkja	20	21	24	27	28	29	30	32	37	43
Annar húðkrabbi	136	145	158	173	187	207	232	251	278	295
Prostata	13	26	53	67	91	116	151	171	199	238
Testikel	82	83	87	90	98	107	110	114	114	117
Landrás og nýru	41	44	47	49	56	62	74	88	102	122
Heilin og miðnervalagið	35	35	35	35	35	36	37	38	39	40
Lymfur og blóðvevnaður	58	61	70	75	87	99	105	123	134	148

Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Talva 3 vísir prevalentar tilburðir hjá føroyskum kvinnum, býtt eftir útvaldum diagnosubólkum og árstølum. Størsti bólkurin hjá kvinnum er bróstkrabbi, við 492 á lívi við ársenda í 2022.

Talva 3. Prevalensur fyri kvinnur býtt eftir diagnosubólkum og ári.

	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Títtleiki (samanlagt)	1179	1239	1319	1402	1505	1630	1753	1894	2044	2192
Høvd og hálsur	21	23	24	29	30	34	35	40	46	48
Tjúkktarmur	47	50	53	63	74	78	87	101	110	119
Endatarm	6	6	12	14	19	26	31	35	40	46
Andaleiðin	21	23	28	31	35	40	46	51	56	66
Móðurmerkja	48	48	48	51	56	58	60	63	81	89
Annar húðkrabbi	180	202	225	241	266	296	318	348	391	427
Bróst	245	265	288	309	340	372	409	442	468	492
Lívmóðurháls	87	88	90	95	97	100	105	108	110	115
Lívmóður	60	61	64	72	76	85	89	95	98	105
Eggjastokkar	0	0	2	2	4	7	8	11	14	20
Landrás og nýru	17	17	21	23	24	28	31	36	38	46
Heilin og miðnervalagið	17	17	17	19	19	20	21	22	22	23
Lymfur og blóðvevnaður	38	41	46	47	51	60	74	79	90	95

Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

3.1 Gongdin í prevalensinum 2013-2022

Prevalensurin kann nýtast til at meta um nøgdina av persónum, ið møguliga hava tørv á uppfylging og endurvenjing innan einstøku diagnosubólkarnar. Mynd 12 vísir gongdina í prevalentum tilburðum sammett við gongdina av nýggjum tilburðum (insidens) tey seinastu 10 árini býtt eftir kyni. Yvir alt tíðarskeiðið hevur prevalensurin bæði hjá kvinnum og monnum víst eina støðuga hækking.



Mynd 13. Prevelensur fyri árini 2013-2022. Kelda: Krabbameinsskráin 15. novembur 2024, Heilsustýrið.

Yvir alt tíðarskeiðið frá 2013 til 2022 er lutfallið millum prevalens og títtleika økt fyri bæði menn og kvinnur, sum merkir, at fleiri persónar liva við krabbameini. Hetta stavar lutvíst frá eini hækking í tali av diagnostiseraðum krabbameinstilburðum seinastu árini og lutvíst frá eini betran í yvirliving hjá sjúklingum við ávísum krabbameinssjúkum.

Í 2022 vóru 300 fleiri persónar enn í 2021, sum livdu við eini krabbameinsdiagnosu, svarandi til eina hækking á 8,19%. Hetta fevnir um 148 kvinnur og 152 menn við eini hækking uppá 7,2% hjá kvinnum og 9,4% hjá monnum.

4.0 Fylgiskjøl

Fylgiskjal 1

Diagnosubólkar	ICD-10
Høvd-og hálskrabbi, ink. Skjaldkertil	C0.0 --> C14.8, C30.0 --> 32.9, C73.9
Tjúkktarmskrabbi	C18.0 --> C19.9
Endatarmskrabbi	C20.9 --> C21.8
Andaleiðskrabbi	C33.9 --> C34.9
Móðurmerkjakrabbi	C43.0 --> 43.9
Annar húðkrabbi	C44.0 --> C44.9
Prostatakrabbi	C61.9
Testikelkrabbi	C62.0 --> 62.9
Bróstkrabbi (kvinnur)	C50.0 --> C50.9
Lívmóðurhálskrabbi	C53.0 --> 53.9
Lívmóðurkrabbi	C54.0 --> 55.9
Eggjastokkakrabbi ink. Eggjaleiðara og bindivevnaði	C56.0 --> 57.9
Landrás-og nýrukrabbi	C64.9 --> C68.9, D09.0 --> D09.9, D30.0 --> D30.9, D41.0 --> D41.9
Heilin og Miðnervalagið	C70.0 --> C72.9, C75.1 --> C75.3, D32.0 --> D33.9, D35.2 -->
Lymfur og blóðvevnaður	C81.0 --> C96.9, D45.9 --> D46.9

Fylgiskjal 2

Diagnosubólkar	kvinnur	menn
Títtleiki (samanlagt)	1474	1535
Høvd-og hálskrabbi, ink. Skjaldkertil	37	77
Tjúkktarmskrabbi	114	137
Endatarmskrabbi	51	60
Andaleiðskrabbi	111	139
Móðurmerkjakrabbi	44	29
Annar húðkrabbi	278	191
Prostatakrabbi	0	289
Testikelkrabbi	0	43
Bróstkrabbi (kvinnur)	310	0
Lívmóðurhálskrabbi	38	0
Lívmóðurkrabbi	63	0
Eggjastokkakrabbi ink. eggjaleiðara og bindivevnaði	39	0
Landrás-og nýrukrabbi	51	127
Heilin og Miðnervalagið	24	24
Lymfur og blóðvevnaður	90	139

Fylgiskjal 3

Menn	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Títtleiki (samanlagt)	461,4	331,8	474,5	361,7	470,7	592,7	497,7	443,7	455,1	498,5
Høvd og hálsur	18,4	27,3	12,1	18,8	22,6	31,6	21,6	19,3	36,5	25,0
Tjúkktarmur	21,0	22,3	50,3	19,3	35,5	60,3	47,9	42,9	38,9	55,9
Endatarm	3,3	3,7	18,7	14,5	6,7	26,3	33,1	19,3	19,7	27,3
Andaleiðin	33,4	27,5	48,4	38,9	54,9	72,6	38,7	31,5	26,2	33,3
Móðurmerkja	3,8	3,3	9,3	16,1	4,6	9,4	2,7	9,3	14,8	18,6
Annar húðkrabbi	60,2	31,1	45,2	47,8	44,5	71,9	85,3	58,8	81,0	52,5
Prostata	33,3	51,7	112,8	58,4	89,2	101,4	110,8	63,2	83,5	109,1
Testikel	33,2	4,7	16,0	13,4	32,4	37,5	12,5	16,5	0,0	12,0
Landrás og nýru	29,3	15,2	27,5	27,8	30,5	43,2	44,1	59,0	45,3	51,5
Heilin og miðnervalagið	19,3	0,0	2,8	8,6	5,7	11,1	2,7	15,8	2,6	4,2
Lymfur og blóðvevnaður	31,3	31,1	47,6	37,8	55,0	44,8	33,4	61,6	40,8	40,9

Fylgiskjal 4

Kvinnur	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Títtleiki (samanlagt)	447,8	436,5	451,0	485,1	498,2	585,0	525,1	618,3	663,7	569,8
Høvd og hálsur	14,7	8,8	7,1	32,4	3,7	20,9	6,6	20,6	24,6	6,6
Tjúkktarmur	29,8	26,6	34,7	58,5	53,7	19,1	35,2	64,3	39,2	35,4
Endatarm	4,0	0,0	22,4	10,3	28,7	34,7	17,1	14,3	26,2	18,7
Andaleiðin	25,4	25,0	51,3	39,4	34,5	30,3	41,3	45,8	38,9	42,8
Móðurmerkja	9,7	0,0	0,0	9,7	23,0	7,4	8,3	9,7	68,6	29,2
Annar húðkrabbi	81,8	91,8	95,3	62,2	96,0	119,3	85,2	105,8	147,4	122,8
Bróst	109,4	110,0	90,4	95,1	120,3	123,2	132,7	119,3	110,3	85,6
Lívmóðurháls	7,4	5,0	13,7	30,1	12,9	19,0	23,8	11,1	8,2	22,7
Lívmóður	17,1	11,6	11,5	28,0	21,3	33,4	24,1	30,5	20,1	21,1
Eggjastokkar	3,8	10,1	18,4	10,3	15,6	13,6	6,1	15,4	19,6	23,5
Landrás og nýru	10,9	3,4	18,1	9,7	14,4	31,0	12,7	22,7	16,1	32,4
Heilin og miðnervalagið	3,8	15,5	5,0	24,8	3,7	8,3	12,2	10,7	3,7	2,9
Lymfur og blóðvevnaður	22,0	31,2	44,5	20,3	23,8	37,1	52,5	18,7	47,2	21,9

Heilsustýrið

Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo